Søljan-Kyndil 16-23 (7-10):

# Avgreiðsla hjá Kyndli

Kyndil vann uttan stórvegis trupulleikar, tá tær leygardagin vóru á vitjan hjá Søljuni.

Fyri steðgin var munurin millum liðini ikki tann heilt stóri, og kanska hevði Kyndil eisini hug at taka sær av løttum. Seinastu tíggju minuttirnar fyri steðgin megnaðu tær tó at leggja motstøðuna aftur um seg, og so hildu tær fast restina av dystinum.

**Fakta um dystin**

**Søljan-Kyndil 16-23 (7-10)**

**Málskjúttar**

**Søljan:** Heidi Maria Akselsen 5, Sólja Jóanesdóttir 4(1), Arnleyg Haraldsen 2(1), Louisa Niclassen 2, Fía Selma Nielsen 1, Hertha Simonsen 1, Irdi Mikkelsen 1

**Kyndil:** Linda Andriulyte 6, Jórun Ludvík 4, Súsanna Petersen 4, Anja Heinadóttir 3, Eyðritt Andreasen 3, Linda Weihe 2, Hildur Høghamar

**Brotskøst:** Søljan 3, Kyndil 1

**Útvísingar:** Kyndil 2

**Dómarar:** Sámal Paulason & Kristian Johansen.

---

Stjørnan-Tjaldur 35-25:

# Tryggur Stjørnusigur

Eftir greiða sigurin á VB leygardagin, kundu tær hjá Stjørnuni taka sær meira av løttum sunnudagin. Tá kom Tjaldur á vitjan, men talan varð ongan tíð um spenning av nøkrum serligum slag.

Tjaldur slapp kortini at spæla við í dystinum, men sæð burtur frá fyrstu fáu minuttunum, so setti Stjørnan seg trygt á dystin.

Tíverri hava vit ikki hagtølini yvir dystin,tá dómaraseðilin ikki er tøkur.

-jm

VÍF-Kyndil 31-26 (16-11):

# Mundu tveitt alt fyri borð

**VÍF hevði fult tamarhald, og teir vóru níggju mál framman fyri Kyndil. Men tað var um reppið, at teir tveittu alt hetta fyri borð í 10 minuttir**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*




*Jákup Suni Andreasen og liðfelagarnir í VÍF tóktust ógvuliga tendraðir, tá teir sum fyrsta liðið í ár basti Kyndli*
*Mend: Jens Kristian Vang*

Vestmenningar høvdu ongan sum helst hug at lata Kyndil stinga avstað undan hinum liðunum. Somikið stóð greitt longu eftir fyrstu fáu minuttunum í Vestmanna sunnudagin.

Snøgt sagt, so bendi byrjanin á, at VÍF rætt og slætt skuldi hølva teir grønu ígjøgnum, og munurin millum liðini bæði toygnaði alt meira á máltalvuni.

Tað var tó kanska meira vánaligt Kyndils-spæl, sum hevði hesa støðuna við sær. Hvørki av liðunum tóktist hava nakað serliga gott tak á verjupartinum, og fleiri ferðir sluppu menn alt ov lætt at spáka gjøgnum verjurnar. Men í mun til teir grønu, so megnaði VÍF at skora upp á sínar møguleikar. Hjá Kyndli varð talan í allar flestu førum um vánalig skot, og so tóktist Dejan í VÍF-málinum eisini at hava ein góðan dag, har hann fyri tað nógva las mótstøðuna rætt av.

**Uttan mál og mið**

Og so tóktist tað fyri tað allarmesta, sum hevði VÍF fult tamarhald á. Teir fingu spakuliga verjuspælið at koyra betri, og tó at Kyndilsmenn stríddust, so tóktist stríðið í nógvum førum at vera einsæris og uttan mál og mið.

Ikki minst kom hetta til sjóndar, tá seinni hálvleikur byrjaði. Skuldi Kyndil aftur í dystin, so kravdi tað helst eina góða byrjan upp á seinna hálvleik. Men her vóru vestmenningarnir so púrasta ósamdir. Við fullari ferð koyrdu teir á, og tá teir grønu skiftust um at fremja mistøk, vórðu hesi revsaði uttan nakra sum helst náði.

**At kanna sær skinnið**

Gongdin bendi alt meira á stórsigur og sanna eyðmýking, men brádliga kom vend í. Kanska hildu teir hjá VÍF, at sigurin var komin í hús, og tí tóku teir sær meira av løttum.

Men Kyndil hevði ikki givið skarvin yvir. Við støðuni 25-16 fingu teir knappliga eini tvey mál á rað, meðan vestmenningarnir vóru í undirtalsstøðu. Og so fingu teir tevið av stigum. Við einum máli fyri og øðrum eftir varð munurin skorin niður. Stríðsviljin og sigurstrúgvin tóktist bara økjast, so hvørt sum teir nærkaðust VÍF, hvørs spælarar tóktust alt meira ráðaleysir. Ein støða, sum ikki er heilt óvanlig, tá lið fyrst hevur sett ferðina niður.

Heilt spennandi gjørdist tað, tá Kyndil hevði vunnið seg á 25-23. Dómararnir høvdu júst bríkslað fyri brotskastið, og so kundi munurin gerast bara eitt mál. Kanska var tað eitt mistak, at lata somikið ungan spælara royna seg, men Hjalti Jacobsen hevði verið tryggur undan hesari royndini. Eli Müller megnaði tó at lesa hann rætt av, og tá Kyndil í eftirfylgjandi VÍF-álopinum fekk tvær útvísingar, fall avgerðin. VÍF sópaði ivan burtur við nøkrum skjótum kontra-álopum, og so kundu teir grønu bara iðra seg.

**Meistararnir eru við**

Enn er tað tó Kyndil, sum liggur á odda í kappingini, men munurin er nú minkaður í tvey stig. Samstundis mundi tað vera ein lætti hjá hinum liðunum at staðfesta, at teir grønu kanska ikki eru so heilt einaráðandi kortini.

Og hjá VÍF var talan um tiltrongdan sigur. Avrikini higartil hava sveiggjað nakað í dygd. Men við hesum sigrinum staðfestu meistararnir, at teir aftur í ár vilja verða heilt har frammi.

## FAKTA UM DYSTIN

**VÍF-Kyndi l31-26 (16-11)**

**Málskjúttar**

**VÍF:** Agnar Joensen 10(1), Sámal Joensen 6, Harald Bjørgvin 5, Jákup Suni Andreasen 4(2), Regin Joensen 4, John Zachariassen 1, Áki G. Olsen 1

**Kyndil:** Marius Joensen 6, Ken Zachariassen 5(1), Hans Áki Dal Christiansen 3(2), Høgni Klein 3(3), Ragnar Stakksund 2, Hans Arni Thomsen 1, Rókur Akralíð 1, Janus Einar Sørensen 1, Hanus Johansen 1

**Brotskøst:** VÍF 4, Kyndil 9

**Útvísingar:** VÍF 9, Kyndil 6

**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen. Høvdu ilt við at halda nakra greiða linju.

StÍF-H71 26-31 (15-13):

# Hoyvíkingar reistust

**Eftir ein lakan fyrra hálvleik setti H71 ferð á eftir steðgin. Og enn eru teir við í bólkinum, sum eltir oddaliðið**

ATLANTIC AIRWAYS-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Strandingar iðraðu seg eftir dystin móti H71 sunnudagin. Fyri steðgin hevði heimaliðið nevnliga eitt sera gott tak á gestunum, sum ikki tóktust hava styrkina at reisa seg eftir vónbrotið móti Kyndli seinasta vikuskiftið.

Hvørt tað var bragdliga byrjanin hjá VÍF í Vestmanna, sum var atvoldin, er ilt at siga. Men í øllum førum kom annað skil á spælið hjá H71 eftir steðgin. Stóra verjan fekst brádliga at rigga, soleiðis at skotsterku strandingarnir mest sum ikki sluppu framat. Og so broyttist støðan á máltalvuni heilt skjótt.

Eitt korter inn í seinna hálvleik var støðan 20-23, og so høvdu hoyvíkingarnir av álvara fingið luft. Teir loyvdu á ongan hátt StÍF aftur í dystin, sum altso endaði við tryggum útisigri.

At VÍF so eisini helt fast í dystinum móti Kyndli, mundi bara hóva H71 heilt væl. Munurin upp til oddasessin er nú aftur tvey stig, og tað er jú nakað, sum skjótt kann broytast.

Hjá StÍF varð talan hinvegin um vónbrot, sum av álvara kastaði skugga á góðu avrikini hjá liðnum í seinastuni. Enn er liðið tó hampuliga væl fyri í kappingini, og enn eiga teir heimadyst á móti Kyndli. Ein dystur, sum væl kann vísa seg at vera avgerandi fyri, hvørja støðu strandingarnir skulu hava restina av kappingarárinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-H71 26-31 (15-13)**

**Málskjúttar**

**StÍF:** Sveinur Justinussen 7, Bárður Danielsen 5, Bend Djurhuus 4, Borgar Danielsen 3, Artur Johansen 3(1), Alexandur Johansen 2(1), Leivur Justinussen 1(1), Jørmund Joensen 1

**H71:** Piti Negru 8, Tróndur Vatnhamar 7(2), Jakob Jónsson 5(1), Niels Viggo Niclassen 4, Heini Bendtsen 3, Johnny Durhuus 3, Sigtór Andreasen 1

**Brotskøst:** StÍF 6, H71 3

**Útvísingar:** StÍF 5, H71 5

**Dómarar:** Kristian Joensen & Karstin Joensen

# Halgir ivast

Halgir Dahl Olesen hevur nógvu tey seinnu árini verið ein av týdningarmestu brikkunum á H71-liðnum.

Støðugt hevur talan tó verið um trupulleikar við knænum, sum til tíðir hava elvt til heilt stóra pínu. Og nú tykist tað vera spurningur, hvørt hetta fer at steðga honum heilt.

Sunnudagin var hann ikki partur av liðnum hjá StÍF. Skaðin, sum hann øll árini hevur havt í knænum, ber nú steðg við sær, og komandi vikurnar fara at vísa, hvørt hann verður førur fyri at spæla aftur ella ikki.

Men kenna vit Halgir rætt, so skal í øllum førum standa heilt illa til, um hann velur at sleppa hondbóltinum. Ikki minst nú hondbóltsárið hjá H71 tykist gerast tað mest spennandi í fleiri ár.

-mørk